# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Gott og væleydnað tiltak

Innsavningin til frama fyri Krabbameinsfelagið hevur eydnast stak væl, og tað kunnu vit øll vera fegin um.

Stóra tiltakið í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið var eisini sera væleydnað. Í samfullar fýra tímar varð sett fokus á krabbameinsjúkuna, sum hevur ella hevur havt so svárar avleiðingar fyri nærum hvørja familju í landinum.

Kringvarpið gjørdi eitt gott arbeiði og hevði fyrirreikað seg væl til tiltakið og vitjaði heim og familjur kring Føroya land, sum hava verið og eru rakt av herviligu sjúkuni. Hetta vóru kenslusamar løtur hjá bæði áhoyrarum og síggjarum. Hugvekjandi var at lýða á, meðan sjúklingar og avvarandi greiddu frá sínum sjúkusøgum og hvat verður gjørt fyri at basa sjúkuni. Mong tár fullu hesar tímarnar. Men samtíðis varð løtan eisini merkt av eini trongd og vilja til at hjálpa og stuðla og til at geva eitt íkast til minka um árinini av sjúkuni og í síðsta enda at koma sjúkuni til lívs. Tiltakið røkk harvið sínum endamálum – bæði at seta fokus á sjúkuna og at savna inn pening til m.a. at basa henni.

Fleiri av okkara bestu tónleikarum gjørdu sítt til at seta fokus á krabbamein og vóru harvið eisini ein týðandi drívmegi til, at so mong fólk, virki og fyritøkur kring landið lótu pening til Krabbameinsfelagið. Ikki minst setti okkara kæra og frægа Symfoniorkestur sín serstaka dám á. So tónleikurin kveikti ljós í øllum myrkurinum.

Tað komu góðar 5 mill. kr. inn til tiltakið, sum nú fara at vera brúktar til fyribyrging, til viðgerð og til gransking innan krabbameinssjúkur. Hetta er ómetaliga flott og eiga øll tøkk uppiborna, eingin nevndur eingin gloymdur.

Tað eru 30 ár síðani, at einstaklingar tóku stig til at stovna Krabbameinsfelagið. Felagið hevur verið rættiliga virkið øll hesi árini, og í dag hevur tað ómetaliga stóran týdning fyri bæði sjúklingar og teirra avvarandi men eisini fyri samfelagið Føroyar sum heild. Tað røkir í veruleikanum eina týðandi samfelagsliga uppgávu. Tað er tí hugaligt hjá fólkunum, sum starvast í felagnum, at tað nú eru skaptir enn betri og rúmari karmar, soleiðis at fólk við sjúkuni og teirra avvarandi framhaldandi kunnu fáa hjálp og stuðul.

Vit kunnu bert vóna, at innsavnaði peningurin fer at koma øllum samfelagnum og øllum føroyingum til góða so ella so. Við hesum ynskja vit Føroya Felag móti Krabbameini góða eydnu víðari næstu 30 árini, og vónandi kemur tann dagur, tá tað ikki er so nógv brúk fyri felagnum longur. At innsavnaði peningurin og annars onnur stig í samfelagnum kunnu gera sítt til at fyribyrja sjúkuni og lekja hana, har hon ger um seg.

**Sosialurin**

## Laðið Stóragarð upp aftur, TK! Bøgarðar og gróthús eru satt prýði

**EYÐUN Á BORG**



**STÓRIGARÐUR:**
Hevði tað ikki verið eitt gott hugskot at farið undir at laðað Stóragarð upp aftur, har tað ber til? Norðasti partur av garðinum stendur so prýðiligur uppi enn. Tórshavnar kommuna er 100 ár í ár, og kanska liggur okkurt oyra frá hundraðárahaldinum eftir á kistubotninum!?

**BØGARÐAR OG GRÓTHÚS:**
Hugaligt at síggja bøgarðar og gróthús í Húsavík og gróthús við Leitisvatn. Vit mugu heldur ikki gloyma grótbygningarnar í Havn, sum argjamenn laðaðu í síni tíð.

Grótgarðurin rundan um prestagarðin í Sandagerði átti at verið eitt sindur hægri. Aðrir grótgarðar har á leið kundu eisini trongt til eina bøtandi hond. Kundi annars ikki meir verið gjørt við at laðað gamlar grótgarðar / bøgarðar upp aftur í kommununi?

Hvussu við at laða bøgarðarnar á Argjum upp aftur? Hvat er annars kommunalt, og hvat er privat? Harmiligt at síggja gongugøtur verða lagdar so tætt upp upp at gomlum, niðurrapaðum bøgørðum, at tað ikki ber til at laða garðarnar upp aftur!?

Eg tori ikki at nevna, hvat hendi við fornu bøgørðunum, sum hoyrdu til spitalska sjúkrahúsið á Argjum!!

**E.S.:** Man ætlaða arbeiðið við at opa Havnará fara í gongd í hesum hundraðáraárinum?

*Við grótlaðingarkvøðu á Argjum í haruskjóting 2009*

## Lítil rættleiðing til Sigvald Kristiansen

**AKSEL V. JOHANNESEN**
landsstýrismaður í heilsumálum



Í viðmerking, sum varð prentað í bløðunum herfyri, ber formaðurin í Landsfelag Pensjónista fram, at felagið ikki hevur fingið uppskotið um Heilsutrygd til ummælis.

Hetta er ikki rætt. Landsfelag Pensjónista fekk uppskotið til ummælis 13. oktober - sama dag, sum aðrir ummælispartar. Landsfelag Pensjónista hevur eisini greitt úr hondum eitt vala svar, sum var Heilsumálaráðnum í hendi tann 26. oktober, og eru fleiri av viðmerkingunum tiknar til eftirtektar. Stóra tøkk fyri tað.

## Hey Andrias Berglíð

**EYÐUN JOHANNESEN**



Spurningur: Eg fari her vinarliga at biða teg um, og fortelja mær, hvat tað er, sum tú meinar við, tá tú, 16. oktober í Sosialinum sigur, (citat. Teir,) tað er Óli Jacobsen og Eyðun Johannesen hava fleiri ferðir tikið avgerðir, sum aðrir nevndarlimir bara hava hoyrt um í pressuni. Cit. Endað. )

- Hvat eru hettar fyri avgerðir, nær og í hvørjum sambandi er hettar gørt?

Hettar er mín stutti og greiði spurningur til tína ábreitslu.

Andrias! Tú noyðir meg, at svara sama veg, tá tú loypur á meg, hendan vegin, í fjølmilinum.

Ein ting beinan vegin, slíkar avgerðir eru mær fullkomuliga ókendar og hartil ósannindir, so tað stendur eftir.

Kanst tú svara mær upp á tað?

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.